# Her búgva tey fýra

**1 + C**



Sonne Smith, journalistur og konsulentur, býr í Havn

*Tað er kona Sonna, Kára Gunna, sum hevur innrættað stovuna, og tað er hann væl nøgdur við. Tey hava ongan ávísan stíl, men tað skal vera ljóst inni.Húsini eru gomul, og møblarnir bæði nýggir og gamlir, arvaðir og keyptir. Tey ganga høgt upp í góða list, bæði málninga- og leirlist. Flestu verkini ímynda kvinnuna og eru av listakvinnum.*

**3 + B**



Guðrun Rógvadóttir, samskipari hjá Guðrun & Guðrun, býr í Danmark

*- Ljós, ljós, ljós, sigur Guðrun Rógvadóttir, sum fyri tað kundi búð í einum vakstrarhúsi. Tí vil hon heldur ikki síggja gardinur fyri vindeyguni. Annars dámar henni best at blanda nýtt og gamalt og at seta sín persónliga dám á heimið. Sum hon sigur, so er tað ov lætt sloppið bara at keypa sær eina dýra heildarloysn.*
*- Tá er tað stuttligari at skapa nakað sjálv, sigur hon.*

**2 + A**



Anna Mortensen, leiðari fyri Ungdómshúsið á Tvøroyri og PAU bindikona

*Húsini, sum Anna Mortensen býr í, eru gomul.*
*- Mær dámar væl tað gamla, til dømis snikkaragjørdir møblar. Í stovuni er alt sovorðið gamalt, sum eg havi funnið, ella sum hevur staðið her í húsinum frammanundan. Eg brúki heldur pengarnar til góða list, og bøkurnar skulu standa frammi í stovuni, sigur hon.*

**4 + D**



Rúna á Heygum, songkvinna, býr í Havn

*Eg havi ongan stíl. Møblarnir eru rættiliga tilvildarligir, og eg gangi slett ikki upp í design. Borðið havi eg keypt á loppumarknaði, stólarnar fann eg á Sandvíkahjalla og hillasystemið trongir til at skal skiftast út.*
*– Tað einasta, eg gangi upp í, eru myndirnar á vegginum. Tær hava stóran týdning. Og so, at ljósið er í lagi, og at tað sum heild er hugnaligt inni, sigur Rúna á Heygum.*

---


VÁRIÐ 2009

GRAFIK STUDIO



**Hevur tú trupulleikar av SILVURFISKUM ella TVÍSTERTUM?**




TRINOL… at nýta fyri øll skordýr og smákykt sum flugur, vespur, tvístertur, silvurfiskar, mølir, klukkur, loppur, eiturkoppar o.s.fr.

MBM BÚRØKT

Vegurin Langi 188 Hoyvík Tel 309005

Sosialurin
...altíð við tí nýggjasta




Tekna teg sum haldara nú

kr. 495,-
um ársfjórðingin

Spar 560,- í mun til leysasølu

Send lepan til:
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift: